# UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 3. juli 2017
Mál nr.: 17/00356
Málsviðgjørt: ABD

**Uppskot til**

**Kunngerð um sýn og góðkenning av skipum, ið nýta barlastarvatn**
(Barlastarvatnkunngerðin)

Við heimild í § 1, stk. 2, §§ 7-10, 14, § 15, stk. 2, § 18, stk. 2 og 3 og § 49, stk. 2 í løgtingslóg nr. 165 frá 21. desember 2001 um trygd á sjónum, sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 30. mai 2011, løgtingslóg nr. 61 frá 17. mai 2013 og løgtingslóg nr. 122 frá 15. desember 2014, verður ásett:

*Lógarøki og fyrisiting*

**§ 1.** Kunngerðin ásetur reglur fyri handfaring av barlastarvatni og botnfalli í barlastartangum umborð á skipum.
*Stk. 2.* Ásetingarnar í altjóða sáttmálanum *International Convention for the Control and Management of Ships Ballast Water and Sediments* frá 2004, eftir hetta "sáttmálin", sbr. skjal 1, eru galdandi sambært § 2.

*Endamál og virkisøki*

**§ 2.** Kunngerðin er galdandi fyri skip undir føroyskum flaggi. Kunngerðin er eisini galdandi fyri skip undir fremmandum flaggi á føroyskum sjóumveldi, ella í føroyskum sjógvi, t.e. sjóøkið innan fyri føroyska fiskimarkið, sum ásett í anordning om fiskeriterritoriet ved Færøerne, í tann mun tað er í samsvari við altjóða rætt.
*Stk. 2.* Kunngerðin er ikki galdandi fyri:

1) Skip, uttan mun til flagg, sum ikki eru gjørd til at brúka barlastarvatn,
2) skip, uttan mun til flagg, sum bara hava sama barlastarvatn í heilt lokaðum tangum, og sum ikki verður skift út,
3) skip, uttan mun til flagg, sum bara sigla í føroyskum sjóumveldi ella sjógvi,
4) skip, undir føroyskum flaggi, sum bara sigla í sjógvi undir løgræði hjá einum øðrum landi, og á opnum havi, uttan so at viðkomandi land tekur aðra avgerð,
5) skip, styttri enn 50 metrar, sum ikki rúma meira enn 8 rúmmetrar av barlastarvatni, og sum einans verða brúkt sum stuttleikafør ella kappingarfør, ella sum í høvuðsheitum verða brúkt til leiting og bjarging. Hesi før skulu tó í størst møguligan mun handfara barlastarvatn og botnfall samsvarandi ásetingunum í sáttmálanum, og
6) herskip, hjálparskip, sjúkrahússkip og onnur líknandi skip, sum eitt land eigur ella rekur. Hesi før skulu tó í størst møguligan mun handfara barlastarvatn og botnfall samsvarandi ásetingunum í sáttmálanum.

*Barlastarvatnarætlanir og -dagbøkur*

**§ 3.** Reiðari og skipari skulu tryggja, at manningin hevur kunnleika til skyldur sínar í sambandi við handfaring av barlastarvatni umborð á skipinum, og skulu reiðari og skipari í hesum sambandi hava kunnleika til ætlanina hjá skipinum fyri handfaring av barlastarvatni.

**§ 4.** Reiðari og skipari skulu tryggja, at skip, fevnd av hesi kunngerð, hava eina góðkenda ætlan fyri handfaring av barlastarvatni umborð á skipinum.
*Stk. 2.* Ætlanin fyri handfaring av barlastarvatni skal vera lagað ítøkiliga til tað einstaka skipið, og skal hon, sum tað minsta:

1) innihalda nágreiniligar mannagongdir viðvíkjandi trygd fyri skip og manning í sambandi við handfaring av barlastarvatni, eins og ásett í sáttmálanum,
2) innihalda eina nágreiniliga lýsing av teimum tiltøkum, ið skulu fremjast til tess at seta í verk krøvini til handfaring av barlastarvatni, og tilhoyrandi siðvenju um handfaring av barlastarvatni, eins og ásett í sáttmálanum,
3) innihalda nágreiniligar mannagongdir fyri burturbeining av botnfalli:
   a) til sjós, og
   b) á landi,
4) fevna um mannagongdir fyri samskipan av handfaring av barlastarvatni umborð, ið hevur við sær tøming til sjós, saman við myndugleikunum í landinum, á hvørs sjóumveldi tømingin av barlastarvatni skal fara fram,
5) tilnevna yvirmannin umborð, sum skal tryggja, at ætlanin verður sett í verk á ein fullgóðan hátt,
6) innihalda upplýsingarkrav fyri skip samsvarandi sáttmálanum, og
7) vera skrivað á tí málinum, ið verður nýtt sum arbeiðsmál umborð á skipinum. Verður eitt annað mál nýtt enn enskt, franskt ella spanskt, skal ein umseting av ætlanini til eitt av hesum málunum eisini vera at finna umborð á skipinum.

**§ 5**. Reiðari og skipari skulu tryggja, at skip, fevnd av hesi kunngerð, hava eina barlastarvatnardagbók umborð.
*Stk. 2.* Barlastarvatnardagbókin kann vera ein elektronisk dagbókaskipan, tvinnað saman við aðrari dagbók ella aðrari skipan, men skal hon altíð innihalda tær upplýsingar, sum eru tilskilaðar í ískoyti II, sbr. skjal 2.
*Stk. 3.* Reiðari og skipari skulu harumframt tryggja:

1) At skrásetingar í barlastarvatnardagbókina verða varðveittar umborð á skipinum í minst tvey ár eftir seinastu skráseting, og at reiðaríið eftir hetta hevur atgongd til upplýsingarnar í minst 3 ár.
2) Um tøming av barlastarvatni fer fram sambært sáttmálans reglu A-3 (undantøk), A-4 (veitan av undantaksloyvi) ella reglu B-3.6 (skip, sum tøma barlastarvatn til móttøkuskipanir) ella talan er um aðra ótilætlaða ella óvanliga tøming av barlastarvatni, sum ikki er heimilað í sáttmálanum, skulu orsøkirnar til og umstøðurnar kring tømingina, verða skrásettar í barlastarvatnardagbókina.
3) Barlastarvatnardagbókin skal til eina og hvørja tíð vera lætt atkomulig í sambandi við eftirlit, og er talan um skip, sum ómannað verður sleipað, kann dagbókin vera í varðveitslu umborð á skipinum, sum sleipar.
4) Alt virksemi, sum viðvíkir handfaring av barlastarvatni, skal uttan ógrundaðan steðg skrásetast í barlastarvatnardagbókina. Allar skrásetingar skulu undirritast av skiparanum. Skrásetingarnar skulu vera á tí málinum, ið verður nýtt sum arbeiðsmál umborð á skipinum. Verður eitt annað mál nýtt enn enskt, franskt ella spanskt, skulu skrásetingarnar eisini vera umsettar til eitt av nevndu

málunum. Verða skrásetingarnar eisini gjørdar á almenna málinum í landinum, undir hvørs flaggi skipið siglir, eru tað hesar, sum eru galdandi í sambandi við ósemjur og trætumál.

*Týpugóðkenning av skipan til viðgerð av barlastarvatni*

**§ 6.** Týpugóðkenning av skipan til viðgerð av barlastarvatni skal gerast í samstarvi við eitt av Sjóvinnustýrinum góðkent klassafelag.

*Sýn og váttanir*

**§ 7.** Skip, ið hava eitt bruttotonsatal á 400 ella omanfyri, og eru fevnd av hesi kunngerð, tó undantikið flótandi boripallar, flótandi goymslueindir (FSU) og flótandi framleiðslugoymslur og fermingareindir (FPSO), skulu til sýn eftir reglunum í stk. 2-6.

*Stk. 2.* Eitt fyrsta sýn, áðrenn skipið verður tikið í nýtslu, ella áðrenn váttanin sambært § 10 verður útflýggjað. Hetta sýnið er til tess at vátta, at ætlanin fyri handfaring av barlastarvatni, sum § 4 setur fram krav um, og bygnaður, útgerð, skipanir, fylgilutir, fyriskipanir, tilfar og tilgongdir, tengd at ætlanini, á fullgóðan hátt lúka krøvini í hesi kunngerð.

*Stk. 3.* Eitt endurnýggjanar sýn við hægst 5 ára millumbili til tess at vátta, at ætlanin fyri handfaring av barlastarvatni, sum § 4 setur fram krav um, og bygnaður, útgerð, skipanir, fylgilutir, fyriskipanir, tilfar og tilgongdir, tengd at ætlanini, á fullgóðan hátt lúka viðkomandi krøv í hesi kunngerð.

*Stk. 4.* Eitt millumliggjandi sýn innan 3 mánaðir áðrenn ella aftaná annan ársdagin ella innan 3 mánaðir áðrenn ella aftaná triðja ársdagin fyri váttanina, sum kemur í staðin fyri eitt av nevndu árligu sýnunum, sbr. stk. 6. Millumliggjandi sýn er til tess at tryggja, at útgerðin, skipanirnar og tilgongdirnar fyri handfaring av barlastarvatni, á fullgóðan hátt lúka tey viðkomandi krøvini í hesi kunngerð og sostatt eru í góðum og rakstrarklárum standi. Átekning um, at sýnið er framt, verður gjørd á váttanina, útflýggjað sambært § 10.

*Stk. 5.* Eitt árligt sýn innan 3 mánaðir áðrenn ella aftaná hvønn ársdag, undir hesum eitt yvirskipað eftirlit av bygnaði, útgerð, skipanum, fylgilutum, fyriskipanum, tilfari og tilgongdum, tengd at ætlanini um handfaring av barlastarvatni sambært § 4, til tess at tryggja, at hesi verða hildin við líka samsvarandi stk. 2 og verða verandi nøktandi fyri ta sigling, skipið útinnir. Átekning um, at sýnið er framt, verður gjørd á váttanina, útflýggjað sambært § 10.

*Stk. 6.* Eyka sýn, treytað av umstøðunum annaðhvørt fullfíggjað ella partvíst, sum verður framt í sambandi við eina broyting, útskifting ella týðandi umvæling av bygnaði, útgerð, skipanum, fylgilutum, fyriskipanum, tilfari og tilgongdum, ið eru kravd til tess á fullgóðan hátt at lúka treytirnar í hesi kunngerð. Sýnið skal fremjast á ein hátt, sum tryggjar, at allar broytingar, útskiftingar ella týðandi umvælingar, eru væl úr hondum greiddar, soleiðis at skipið lýkur krøvini í hesi kunngerð. Átekning um, at sýnið er framt, verður gjørd á váttanina, útflýggjað sambært § 10.

**§ 8.** Verður eitt skip fyri einari vanlukku, ella verður eitt brek lagt til merkis, sum munandi ávirkar eginleikar skipsins at handfara barlastarvatn samsvarandi sáttmálanum, skal eigarin, fyristøðufelagið ella annar persónur, sum hevur ábyrgd av skipinum, skjótast gjørligt boða einum av Sjóvinnustýrinum góðkendum klassafelagi frá, sum skal syrgja fyri, at ein kanning verður sett í verk til tess at fáa greiðu á, um eitt sýn sambært § 7 er neyðugt. Um skipið er statt í einari havn í einum øðrum limalandi, uttanfyri føroyskt sjóøki, skal eigarin, fyristøðufelagið ella annar persónur, sum hevur ábyrgd av skipinum, beinanvegin boða viðkomandi myndugleikunum í hesum landinum frá, og tilnevndi eftirlitspersónurin, ella góðkenda felagið, skal vissa seg um, at slík fráboðan er givin.

*Stk. 2.* Skipið og útgerð tess, skipanir og tilgongdir, skulu haldast við líka samsvarandi ásetingunum í sáttmálanum til tess at tryggja, at skipið fær siglt, uttan at tað hevur við sær vanda fyri umhvørvi, heilsu, ogn ella tilfeingi.
*Stk. 3.* Aftaná at sýn av skipinum sambært stk. 1 er framt, mugu broytingar ikki fremjast á skipsins bygnað, útgerð, fylgilutir, fyriskipanir ella tilfar, tengt at ætlanini fyri handfaring av barlastarvatni, sum er kravd sambært § 4, og er fevnd av sýninum, uttan so, at klassafelagið frammanundan hevur góðkent broytingina. Tó er ein beinleiðis útskifting av slíkari útgerð ella fylgilutum undantikin kravinum um góðkenning frammanundan.

**§ 9.** Fyrsta sýnið skal fremjast í sambandi við næsta endurnýggjanar sýnið av skipsins altjóða váttan um fyribyrging av oljudálking.

**§ 10.** Tá krav er um, at váttan verður útgivin, verður váttanin givin út aftaná, at eitt úrslitagott sýn er framt samsvarandi § 7.
*Stk. 2.* Váttanin verður útflýggjað samsvarandi talvuni í skjali 2, ískoyti I.
*Stk. 3.* Ein váttan verður útflýggjað fyri eitt tíðarskeið, sum í mesta lagi er 5 ár.
*Stk. 4.* Verður endurnýggjanarsýn framt, skal váttanin lúka fylgjandi krøv:
1) Verður endurnýggjanarsýnið framt innan fyri 3 mánaðir áðrenn gildistíðin á verandi váttan gongur út, skal tann nýggja váttanin, uttan mun til krøvini í stk. 1, vera í gildi frá tí degi, tá endurnýggjanarsýnið er framt, og til eina dagfesting, ið ikki er seinni enn 5 ár frá tí degi, tá verandi váttan gongur út.
2) Verður endurnýggjanarsýnið framt aftaná, at verandi váttan er gingin út, skal tann nýggja váttanin vera í gildi frá tí degi, tá endurnýggjanarsýnið er framt, og til eina dagfesting, ið ikki er seinni enn 5 ár frá tí degi, tá verandi váttan gongur úr.
3) Verður endurnýggjanarsýnið framt meira enn 3 mánaðir áðrenn gildistíðin á verandi váttan gongur út, skal nýggja váttanin vera í gildi frá tí degi, tá endurnýggjanarsýnið er framt, til eina dagfesting, ið ikki er seinni enn 5 ár frá tí degi, tá verandi váttan gongur út.

*Løggilding*

**§ 11.** Sjóvinnustýrið kann lata klassafeløgum o.ø., ið hava løggilding frá Sjóvinnustýrinum, góðkenna ætlanir fyri handfaring av barlastarvatni umframt tað at fremja sýn hesum viðvíkjandi.

*Revsing*

**§ 12.** Brot á ásetingarnar í hesi kunngerð verða revsað við sekt ella fongsul í upp til 1 ár.
*Stk. 2.* Revsingin kann hækka til fongsul í 2 ár, um brotið er framt við vilja ella við grovum ósketni, og um tað við brotinum er
1) voldur skaði á lív ella heilsu ella elvt er til vanda fyri slíkum skaða,
2) tað áður er givið forboð ella boð um somu ella samsvarandi viðurskifti, ella
3) peningaligur fyrimunur er fingin, ella tílíkur fyrimunur hevur verið tilætlaður fyri viðkomandi sjálvan ella onnur.

*Stk. 3.* Verður lóghald ikki lagt á vinningin, sum er fingið í sambandi við brotið, skal tað í sambandi við ásetan av bótini, herundir ískoytisbótini, verða tikið atlit at støddini av fingna peningaliga fyrimuninum.

*Stk. 4.* Feløg og aðrir løgfrøðiligir persónar verða revsaðir sambært reglunum í revsilógarinnar kapitli 5.

*Gildiskoma*

**§ 13.** Kunngerðin kemur í gildi tann 8. september 2017.
*Stk. 2.* Skip, fevnd av hesi kunngerð, ið hava eitt bruttotonsatal undir 400, skulu lúka krøvini í §§ 4, 5 og 6 í seinasta lagi tann 8. september 2022.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, dagfesting

**Poul Michelsen**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen